# HÚSINI VIÐ BRUNN

## BYGDASAVNIÐ / THE VILLAGE MUSEUM

Brunnahúsini eru bygd í seinnu helvt av 1600-talinum. Upprunaliga eru tey smíðað úr rekaviði, men eystara part av húsunum bygdi Gamli Jáki úr einum stokki úr pommerskari furu, ið varð keypt á uppboði eftir sokallaða Saksunar-skipið, ið fórst í Saksun í 1828. Gamli Jáki brúkti trý sjóvarføll at sleipa stokkin til Nólsoyar, síðani sagaði hann stokkin sundur og bygdi upp í húsini.

Komfýrin í húsunum keypti Gamli Jáki í 1858, og er hetta fyrsti komfýrur her í bygdini og ein tann fyrsti, sum kom til Føroyar. Gamli Jáki kallaði komfýrin kókimaskinan.

Tað sæst, at Brunnahúsini hava verið valahús í bygdini fyrr í tíðini, tí tá ið bygdin fekk vitjan av fólki „av tí betra slagnum", varð ofta farið við Brunn at biðja um hús. Har var altíð leyst og liðugt. Tá varð gingið um dyrnar í ovaru hæddini og boðið varð inn í góðustovu.

Sagt verður, at tá ið kongsvitjan var í Nólsoy í 1907, ynskti kongur, Fríðrikkur VII, at síggja eitt fjós innan. Hann var tá boðin inn í fjósið við Brunn, sum var tað nossligasta, sum var í bygdini tá.

Sama ætt hevur búð í húsunum við Brunn í eini 300 ár. Sum livibreyð hava tey havt ta ognarjørð, sum í skiftandi tíðum hevur ligið til húsið. Umframt jørðina hava teir verið góðir handverkarar og dugað at smíðað fyri seg og onnur. Tað, sum landið ikki gav, fingu tey av sjónum og úr bakkanum. Seinastu húsfólkini við Brunn búðu har fram til 1960.

Húsini við Brunn hava verið ogn Nólsoyar Forminnisfelags síðan 1985. Tey eru sett í stand við stuðli úr Føroya Forminnisfelag og Føroya Forngripafelag.

Húsini við Brunn eru opin eftir avtalu við Kunningarstovuna á +298 527060

---

The village museum, known as Húsini við Brunn (The House by the Well), was built in the late 17th century. It was originally built from driftwood. The eastern part of the house was built by Gamli Jáki in 1828. It was constructed using a single log of Pomeranian pine, which was purchased at an auction after the so-called 'Saksun ship' was lost at sea. Gamli Jáki spent 18 hours towing the log to Nólsoy. Here he used the log as material to build an extension to the house.

The stove was installed by Gamli Jáki in 1858. It was the first of its kind in the village and one of the first stoves used in the Faroe Islands. Gamli Jáki used to called it the 'boiling machine'.

Húsini við Brunn was in particularly high esteem in the village. Affluent people who visited were often housed there. They were invited into the fine living room through the upper door. Legend says that when King Frederik VII of Denmark visited Nólsoy in 1907, he requested to visit a barn. He was invited into the barn við Brunn, as it was the nicest one in the village.

The house was inhabited by the same family for three hundred years. The land has been passed down from generation to generation. Several of the farmers were skilled craftsmen. They farmed the land and fished from the sea. The last family to live at Húsini við Brunn moved out in 1960.

To visit, please contact Visit Nólsoy at +298 527060

